Grønlandstíðindi Kári við Stein

# Nógvur krabbi og lítið av laksi í Grønlandi

**Kári við Stein greiðir frá, at tað er nógvur krabbi at fáa í Grønlandi. Hann greiðir frá dag fyri dag**

**20. juli**
Í dag er dýrdarveður og + 10 stig. Qaqqatsiaq er komin inn at landa og skifta fólk. Teir hava um 350 tons inni, og teir sigldu longu á midnátt til nýggjan túr. Teir vóru ikki meir enn leysir, tá kom Markus til kaj. Teir skuldu leggja um 250 tons upp.

Polar Assik var í Nuuk og landaði í gjár. Har var alt fult hjá teimum. Teir skulla skifta fólk eisini. Polar Natarnaq er á veg til Nuuk at landa við fullari last.

**21. juli**
Í dag er toka og +10 stig. Markus var liðugur at landa í dag. Teir hava knapt 250 tons og skuldu sigla, tá liðugt var. Men har var trupulleiki við einum toppstykki, so teir sigldu aftaná døgurða. Sisimiut kom til Reykjavík í morgun at landa og skifta nakað av fólki út. Teir eru lidnir við svartkalvakvotuna í Eysturgrønlandi. Teir hava 440 tons inni eftir 50 døgum, mest svartkalvi.

Polar Nanoq kom til Hafnafjørð í dag at landa kongafisk. Teir hava 365 tons inni eftir 25 døgum. Nú skulla teir leggja um til svartkalva.

**24. juli**
Í dag kom Akamalik inn at landa. Teir hava gott 300 tons inni eftir einari viku. Tað var ein heitur dagur í dag, + 19 stig og stilli. Akamalik loysti kl 21 til nýggjan túr í kvøld .

Virkið her hevur lukkað fyri avreiðing av krabbum eina viku fram. Bátarnir hava fiskað væl hesa seinastu tíðina. Men tað kemur illa við hjá monnum at missa so nógva fiskitíð, nú meðan veðrið er til vildar og nokk er av krabba.

Herfyri kom ein krabbabátur inn við um 10 tonsum av krabba, men tíverri var alt deytt hjá teimun. Í gjárkvøldið kom ein annar krabbabátur inn við umleið 13 tonsum, har eisini alt var deytt. Teir meina, at sjógvurin er ov heitur um hesa tíðina.

Í fjør lógu teir báðir krabbabátanir í juli. Men tann eini vil royna eitt legg afturat og seta køling á sjógvin, sum krabbin verður goymdur í.

**23. juli**
Í dag + eru 10 stig. Natarnaq er komin inn at landa og skifta fólk. Skipið hevur fulla last henda túrin. Teir skulla skifta fólk eisini. Teir komu við leiguflogfari, tí boðað var frá verkfalli í gjárkvøldi kl 20, men tað er fyri so fyribils útsett.

**24. juli**
Í dag eru + 9 stig. Natarnaq loysti seinnapartin til nýggjan túr.

**28. juli**
Markus er inni í Nuuk og landar.

**30. juli**
Ocean Tiger kom inn í morgun at landa. Teir høvdu gott 360 tons inni. Tveir av manningini fóru út fáa sær eitt kók av toski. Teir komu aftur við 10 kurvun av góðum slag. Agnið er óføra gott, sum kokkurin hevur við at gera.

Krabbabáturin, sum misti tann góða fongin, kom inn aftur við krabba, sum var niðurkøldur. Nú hjálpti hjá teimum, alt prima krabbi.

**1. august**
Nú er veiðutíð fyri reinsdjór. Summir gera skjótt av. Tey fyrstu reinsdjórini komu teir við longu um kl 17. Tey, sum eg sá, vóru kaldarak.

Nú er tíðin byrjað at fiska laks við gørnum. Men har bar lítið til. Eg tosaði við ein laksafiskara, sum hevð ligið alla nátt við 30 gørnum og drivið fyri at halda stórhval burtur frá gørnunum. Teir fingu ongan laks, men nøkur síl vóru í .

Polar Natarnaq kom inn til Aasiat við 160 tonsum og skuldi skifta fólk. Skiparin Karl Thomasen úr Kollafyrið lat væl at. Teir hava fiskað knapt 1.000 tons hetta tørnið, alt sekkjarækjur





**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo


†

## Andlát og jarðarferðir

**Nicodemus Nicodemussen,** Sandi, vanliga nevndur Demmus, andaðist mánadagin á Áargarði, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13 úr Sands kirkju. Tey ið vilja minnast Demmus, kunnu lata Áargarði eina gávu, konta í Føroya Banka.

**Alis Ørvarodd,** Tórshavn andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnumorgunin, 59 ára gomul. Bønarhald verður í kapellinum mikudagin kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 14.00.

Kistan við **Árna Joensen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna mikukvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin klokkan 13.30. Tey, ið vilja minnast Árna, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

## Dagurin

**12. august. Klara,** deyð í 1253, var av aðalsætt úr Assisi. Fór í fylgið hjá hinum heilaga Fransi, og eggjað av honum grundlegði hon eitt nunnukleystur og skipaði eina nunnuskipan,klarisurnar nevndar. Navnið er latínskt, og merkir hin kenda ella skæra.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*